### Fyri 30 árum síðan:

# Stýrimenn í 1977



*Í juli 1977 tóku 14 stýrimenn prógv á Føroya Sjómansskúla, teir vóru: Hans Magnus Hansen, Klaksvík, Gunnar J. Joensen, Sørvágur, Dan F. Magnussen, Tórshavn, Símun Joen-Jacobsen, Sandavágur, Carl-Erik Reynheim, Tórshavn, Daniel Eliasen, Mikladalur, Ólavur S. Hovsgarð, Hovi, Tummas Christophersen, Vestmanna, Beinir Simonsen, Klaksvík, J. Napoleon Purkhús, Kunoy, Jóhannes Lassen, Klaksvík, Jákup Anthoniussen, Klaksvík, Per Lund Gulklett, Argir, og Hans Oluf Johannesen, Klaksvík.*

*Kelda: Myndaárbókin - árið ið fór 1977*

# Størsti bilmarknaður á Føroyska netinum

TÍÐINDASKRIV

Frímarknaðurin Sel.fo á netinum, ið dagliga verður brúktur av privatum seljarum og keyparum, hevur nú Føroya størsta bilmarknað. Klokkan 23.37.39 tann 15. juli 2007 vísti síðan 400 bilar í senn.

Hettar var eitt met, sum eigararnir Arngrím Poulsen og Magni J. Hansen fegnast um.

Síðani oktober 2004 hevur Sel.fo verið ein fríur marknaður fyri privatar seljarar, har skrásetta limatalið nú er komið upp á yvir 3.100. Heimasíðan verður væl vitjað av bæði keyparum og seljarum, har tey javnan síggja, at síðan broytist til teirra fyrimun.

Vit koma við nøkrum broytingar afturat í nærmastu framtíð og vóna at limirnir taka væl í móti teimum nýggju broytingunum, ið hava til endamáls, at gera Sel.fo til eina meira persónliga heimasíðu fyri limirnar, siga Arngrím Poulsen og Magni J. Hansen.



†

## Andlát og jarðarferðir

**Jastrid Olsen**, vanliga nevnd Jastrid á Toft, fer til gravar úr Húsarvíkar kirkju týsdagin klokkan 12. Sungið verður úr sálmabókini. Tey, sum vilja minnast Jastrid, kunna lata eina gávu til Dals kirkju, konta í Eik ella Føroya Banka

**Berint Berhtelsen,** Strendur, andaðist á landssjúkrahúsinum leygardagin 14. juli 66 ára gamal.

**Knút Sonne Olsen,** Funningur, andaðist 14. juli, 77 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Funnings kirkju týsdagin klokkan 14. Tey, ið vilja minnast Sonna, kunnu lata Ellis- og Røktarheiminum í Runavík eina gávu

**Dagurin**

**17. juli Arnolphus**, deyður ár 641. Hann var biskupur í Metz. Eftir deyða hansara henda mong undurverk við grøv hansara, og hann varð skírdur halgimenni.

# Signar á Brúnni skúlastjóri á Ziskatrøð

Landsstýrismaðurin í mentamálum hevur í dag sett Signar á Brúnni sum skúlastjóra í Skúlanum á Ziskatrøð frá 1. august 2007.

Signar er 62 ára gamal. Hann tók læraraprógv á Føroya Læraraskúla í 1969 og hevur síðani tá arbeitt sum lærari og leiðari í fólkaskúlanum. Hann hevur í styttri tíðarskeið verið varaskúlastjóri í Fuglafjarðar Skúla fyrstilærari í Leirvíkar Skúla fyrstilærari í Eiðis Skúla, skúlastjóri í Vestmanna Skúla, og síðani 23. mars 2007 skúlastjóri í Skúlanum á Ziskatrøð.

Signar hevur eisini verið landsstýrismaður, varaløgmaður, limur í Landsskúlaráðnum í mong ár og formaður í ráðnum í tíðarskeiðunum 1979-81 og 1984-89 stendur í tíðindaskrivi frá Mentamálaráðnum.




## Tøkk

Øllum tykkum, sum við gávum, blómum, fjarritum og á annan hátt gleddu meg á mínum 90 ára føðingardegi, takki eg hjartaliga.

*Bestu heilsanir*
**Elsebeth Maria Joensen, Syðrugøta**